# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Til minnis um Líggjas Hansen



Burturstaddur tann 30 August fekk eg um teldubræv tey sorgarboð, at Líggjas var deyður einans 60 ára gamal.

Líggjas var raktur av ringari sjúku fyri nógvum árum síðan, og sum tók hansara besta førleika.

Ikki gekk so long tíð og Líggjas var aftur á fótum, og við einum dirvi sum fáur menti hann seg aftur, og var millum okkum sum einki var hent! Men sjónin var farin.

Eg var lítil piltur, tá Jonna og Líggjas komu saman fyrstuferð, og minnist eg sera væl, fyrstu ferð hann trein dyrnar á Liðanum, sjálvur var hann ein tannáringur!- Vit dreingir smíðaðu kassabil í túninum, ikki var løtan long, so var hann mitt í millum okkum dreingir við sínari hjálpandi hond, at loysa hesa fyri okkum smádreingir sera torføru uppgávu.

Líggjas og bróðurin Egil gjørdu eisini ein lastbil í Føroyingahavnini, sum mangir føroyingar minnast koyra proviant til skipini har á kajøkinum.

Líggjas var bert 9 ára gamal, tá hann av einum systkina flokkið uppá 9 bleiv móðurloysingur, og er tað ein álvarsom kreppa ein lítil smádrongur kann koma í.

Systurin Elinborg, sum giftist Jóhan, tók hann til sín, og bleiv hann uppfostraður har hjá teimun. Vit sum kendu/kennað Elinborg og Jóhan vita, at hann fekk ein tryggan og góðan uppvøkstur hjá teimun! Tað var nakað hann ofta sjálvur segði, at tey vórðu sera góð við seg, Líggjas hevði stóra virðing fyri teimun.

Sum ungur drongur fór Líggjas í læru, á Tórshavnar Skipasmiðju, sum tá var undir leiðslu av gamla Kjartani Mohr. Og Líggjas, sum nógvir aðrir ungir dreingir, komu avlærdir haðani við fullari skjáttu av kunnleika og vitan til víðari brúk í lívinum, og var hetta tíðarskeiðið nakað, sum sermerkti Líggjas alt hansara lív.

Handverkari var hann sum fáur, ofta vórðu boð eftir honum, um okkurt skuldi gerast ella vegleiðing kravdist. Tað kom ikki fyri hann gav noktandi svar, og eru vit nógv sum hava notið gott av hansara teknisku vitan. Nógvir varðar standa eftir hann, sum prógva hansara kunnleika til tað tekniska.

Eisini var Líggjas aktivur í øllum sum fyrifórst! Tað er ikki at dylja, at politiskt var tað javnaðarhugsjónin, sum stóð honum nærmast, og vildi hann at øll fólk skuldu fáa somu treytir og kor at liva undir.

Vit í Sørvági sum stóðu Líggjasi nær, standa spyrjandi eftir! Hví Líggjas.

Hansara ringa sjúka vendi aftur tók yvirhond, og orkaði hann ikki meira standa ímóti.

Jonna góða, vit vita at saknurin er størstur hjá tær, og hava vit øll djúpastu samkenslu við tær og tykkara børnum.

Eisini er saknurin stórur á Liðanum, hvar hann eftir sín langa morguntúr, sum annað hvørt var til Bíggjar ella á Flogvøllin og liðugur at ambatað seyðinum, møttið so trúfastur til kaffi. Hansara seinasti kaffimunnur er drukkin, og hansara pláss á bonkarendanum er tómt.

Tíðin lekir øll sár, sigir mann! Vónandi verður tað so, eisini eftir missin av Líggjasi.

Eg vil við hesum fáu reglum lýsa frið yvir minnið um svágin Líggjas.

**Elian**

## Eitt arbeiðsgrev fyllir áttati

Í dag, 15. september, fyllir Jacob Olivar Joensen í Leirvík, nevndur Jákup við Garð, áttati ár.

Jacob er sonur Pól við Garð og Lenu, sum var ættað úr Vestmanna.

Tey eiga børnini, Poul, Onnu, Hans, Lenu og Tórálv. Øll búgva í Leirvík uttan Lena, sum býr í Danmark.

Pápin, Pól, var bóndi, og tí vaks Jacob upp saman við kríatúrum.

Á yngri árum var hann í Grønlandi í eini tvey ár, og her heima koyrdi hann eisini rutu, umframt at hann hevur róð nógv út.

18. oktober 1955 festi hann garð, og fyri sløkum 30 árum síðan bygdi hann fjós úti á Vík í Leirvík, har hann við tíðini hevði fleiri mjólkneyt, umframt kvígur og kálvar.

Í Búnaðarblaðnum fyri fleiri árum síðan var áhugaverd samrøða við Jacob Olivar, har hesin óføra raski og dugnaligi maður greiddi frá, hvussu tað gekst at leggja lunnar undir fjós og velta upp úr nýggjum úti á Vík.

Í samrøðuni greiðir hann frá, tá ið gamli bøurin í bygdini fjaraði burtur til grundøkir. Hetta dámdi honum lítið.

"Tá ið hann sá, hvønn veg tað bar, fekk hann kommununa at taka allan bøin í senn, so hann var leysur haðani.

Nýggi hagin hjá Jacob Olivari lá nú úti á Vík, og fyrst í sjeytiárunum fór hann at tosa við Jarðarráðið, har hann fekk sín dreingjadreym uppfyltan.

– Eg haldi, at allir partar vóru rættiliga ókunnugir tá um, hvussu farast skuldi undir hetta; tí var tað eitt tógvið stríð at fáa nakað undan, sigur hann í samrøðuni.

Teir báðir feðgarnir, Jacob Olivar og faðirin, Pól, gamli Pól við Garð, sum tá var farin um tey sjeyti, fóru út á Vík at rudda og velta sunnanvert Heyggin Mikla. Gravmaskina var ikki nýtt tá, einans traktorur og fresari. Nógv grót var á lendinum, sum varð drigið saman við traktorinum.

Smiðjur stoypti fjósið og innilokaði tað, og síðan gjørdu feðgarnir tað, ið eftir var.

– Uttan pápa, var alt hetta arbeiði ómøguligt. Uttan hansara arbeiði og stóra áhuga, hevði ikki borið til at fingið fjósið og lendið undan, tí lítil peningur var at arbeiða við, sigur Jacob Olivar í samrøðuni.

Tá ið fjósið úti á Vík var



liðugt út móti jólum 1975, hevði

Jacob Olivar 7-8 neyt at fara út hagar við, harav av trý teirra mjólkaðu. Um hetta mundið, vóru 5 hektarar á Víkini veltir.

– Nú gekk upp fyri mær, hvussu illa fyrireikaður eg var. Kanska hevði eg verið so spentur at fara undir hetta og at sleppa í gongd. Avvarðandi myndugleikar og stovnar komu ikki við nógvum ráðum – og eg spurdi lítið.

Í samrøðuni greiðir Jacob Olivar frá, at studningurin til veltingina fór til avdrátt og rentur, og í fyrstani vaks skuldin bara.

– Eg kundi viðhvørt havt hug at blakað alt frá mær, tí hetta var ein strævin og møðsom tíð, sum einki gav av sær.

Tey fyrstu 5 árini vóru soltin á tí nýggja garðinum, men sum frá leið vaks mjólkaframleiðslan, og í 1980 var hon komin uppá 226.000 litrar um árið.

Feðgarnir, Jacob og Pól, lógu ikki sum knívur á hørðum horni, men komust undan, sum skrivað verður í greinini í Búnaðarblaðnum.

– Fyrst, tá ið tú kundi velja og seta við sjálvur, fór at kvinka, sigur Jacob Olivar, sum í Leirvík verður sagdur at vera av raskastu monnum.

Sonur Jacob Olivar, Poul Joensen, hevur festið og garðin úti á Vík nú og saman við versoninum, Edvardi, reka teir nú garðin.

Vit ynskja Jacob Olivari hjartaliga tillukku á áttiti ára degnum.

**-v.**

Eyðun Bærentsen, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá P/F Leif Mohr

Í dag, 15. september 2004, hevur Eyðun Bærentsen í Havn 25 ára starvsdag hjá P/F Leif Mohr/LM Electric.



Eyðun er 57 ára gamal og ættaður úr Skopun. Hann hevur arbeitt hjá Leif Mohr síðan 15. september 1979.

Hann lærdi til elektrikari hjá Einar Mikkelsen í Havn.

Síðan sigldi hann úti í nógv ár og arbeiddi sum kølimaður hjá Olafi Hansen.

Eyðun hevur nógvar dygdir. Handverksliga setir hann eina æru í góðsku, og at tað er ordan í tingunum.

Sum tann álitismaður Eyðun er, hevur hann verið formaður fyri nógvum stórum arbeiðsuppgávum m.a. Loranstøðini á Eiði, Hotel Føroyum, Gundadalshøllini, Albert Hall, Kartni Winther, ferjuleguni á Gomlu Rætt og tunnlinum í Kaldbaksbotni. Eisini hevur hann havt ábyrgd av at upplæra nógvar lærlingar.

Eyðun er eisini áhugaður í ítrótti - hann hevur súkkla í nógv ár, og hóast hann nærkast teimum 60, er hann sera aktivur og heldur sær í góðari venjing.

Hann er giftur við Tóru, f. á Heygum, ættað úr Vestmanna, tey eiga tvey børn: Mariu, 35 ár, og Jákup Petur 29 ár. Tóra og Eyðun eiga trý ommu- og abbabørn.

### 80 ár

Í dag 15. september verður Sigga Jóhanna Rasmussen, Haraldssund 80 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Haraldssundi leygarkvøldið 18. sept. kl. 19.00.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Lenu Joensen

Ajú, so er hetta summarið liðið, - summarið við góðum og ringum veðri. Summarið við góðum og ringum løtum.

Hetta summarið var serliga ringt hjá tær Fritleif, børnunum og ommu- og abbabørnunum. Eisini var summarið hjá øllum okkum, sum stóðu hjá, ein hvøkkur, og vit hugdu spyrjandi at. Vit vórðu enn einaferð mint á, hvussu dýrabart lívið er, og hvussu skjótt tað kann verða tikið.

Røðin av hvøkkum hesu seinnu árini hevur verið long hjá tykkum. Í hesum tungu løtunum var Lena tær góð at hella til. Tó - Lena legði nú frá sær uttan at siga frá ella at tað vardi nakran. Kanska betri, heldur enn at liggja leingi á strá, tá so skuldi verða.

Lena; Bónda-Lena, sum vit eisini kallaðu hana, var av sonnum ein megnar kvinna. Ómetaliga røsk, kvik og reinfør. Hevði stóra umsorgan fyri sínum og var hjartagóð - Tað feyk frá henni og verkið var hegnisliga og væl gjørt; reinleikin altíð í hásæti. Hetta merkti sjálvandi eisini heim tykkara, har alt hevði sítt pláss og ein kærlig hond hevði verið eftir øllum. Lena var sterk og løtt av lyndi, dámdi væl ein góðan látur. Tað var ongantíð keðiligt har Lena var.



Tú Fritleif hevur verið ein merkismaður og brotið upp úr nýggjum. Funnið nýggjar leiðir og hættir á einum garði, sum hevur verið bundin at aldargomlum siðvenjum.

At reka ein garð, uttan eina kvinnu, sum orkar og vil vera við, ber at kalla ikki til - her hevur tú havt tín stóra stuðul í Lenu til dagliga yrkið á garðinum og heima. Ja, tað hevði kanska ikki borið til uttan Lenu at brotið so upp úr nýggjum, sum tú hevur gjørt. Tí hon var tín holli stuðul og var viðvirkandi til, at tú tordi og orkaði at fara undir fyrimyndarligu verkætlanir á garðinum, sum eisini hava víst øðrum á nýggjar leiðir.

Tí er tað serliga tómligt, nú tín betri helmingur ikki er at ríka tær lívskvøldið. Tit høvdu nógv at tosa um og nógv at vera saman um - her serliga ommu- og abbabørnini og ikki minst lítla Fritleiv, sum av røttum hevur vunnið sær stórt rúm í hjørtum tykkara.

Til jarðarferðina sat hann so fittur og reisti ommuni ein minnisvarða við at skriva "Omma" í sandin framman fyri ta opnu grøvina. Samstundis hugdi hann undrandi at manninum í tí svarta kjólanum, sum segði ymisk óskiljandi orð. Fritleivur reistist og troystaði grátandi mammu sína: "Hví grætur tú? Omma er jú hjá Jesu-pápa!" Jú, einfalda barnalundin kann geva okkara iva royndir, men tó troyst í einfalda boðskapinum.

Í sælum bústaðum bíða Lena og Jógvan okkum saman við øllum hinum, ið undan eru farin.

Við ríkum minnum um eina góða farna tíð saman við eini megnar kvinnu, kanst tú líta aftur um bak og ikki smæðast við vala førningin, tit bæði settu eftir tykkum - tú kanst rætta ryggin og vera glaður.

Við góðu minnunum verið tær troyst og uggi, saman við tínum kæru og vinfólkum.

Friður verið við minnunum um Lenu Joensen - Bónda-Lenu.

**Dávur**

## Minneord

Fem år gammel hørte jeg første gang om Masa. Elsa og Martin hadde vært over på Færøyene i barnedåp. De kom hjem med masse og fortelle og med gaver fra Masa og Sofus. Med årene ble vi barna godt kjent med Sofus, Masa hørte vi bare om så etter hvert ble hun en eventyrskikkelse i barns øyne. Med årene vokste lysten til å se dette landet og kvinnen vi hadde hørt så mye om. Selv om avstanden mellom Rituvik og Hammerfest var stor holdt vennskapet mellom Masa og min mor. De eide et helt spesielt forhold til hverandre.

Disse to kvinnene var selvstendige, sterke og med en usedvanlig samstemt humor. Brev og telefoner og i eldre år flere besøk styrket forholdet.

Vennskapet skulle vare livet ut.

Selv kom jeg endelig til Færøyene i 1986, og fikk oppleve Masa og hennes familie. Det ble som og komme hjem,,, Masa var den Sagakvinnen hun med årene hadde blitt til i mitt hode.

Høyreist og varm, omsorgsfull og med innlevelsesevne, men også travel. Travelheten var der for å tjene og å gi omsorg. Effektiv var hun også og bestemt kunne hun og være når det var nødvendig.

Slik fikk jeg lære denne kvinnen å kjenne og ikke minst oppleve disse to damene sammen. Som de frydet seg sammen, det var en fryd og høre dem le så hjertelig sammen..

Masa tenkte bare på at vi skulle ha det bra, hun var en uselvisk kvinne. Hennes kjærlighet til barn, svigerbarn, barnebarn familie og venner hadde ingen grenser.

Vi ble rikere av å kjenne henne, hun var et eventyr av en kvinne, en saga skikkelse som vi er inderlig takknemlig for å ha fått lov til å være sammen med. Takket være henne og familien rundt har det blitt mange turer over havet.

Så skulle det bli så merkelig at de fulgte hverandre til slutt, disse to kvinnene. Masa fikk budskapet om mammas bortgang og ble samme kveld sendt til sykehus for så aldri mer vende tilbake til Rituvik. Den samme uken ble de stedt til hvile. Familien din og vi her i Norge sitter igjen med sorgen og savnet, men rikere som mennesker etter å ha fått lov til å oppleve nærheten og varmen fra deg.. Takk kjære Masa for alt du var for oss, styrken din, travelheten, humøret og replikken, din helstøpte personlighet.

Fred over ditt minne.

**Else Marie**

### Dagurin

**15. september. Mariumessa síðari**. Dagur holdin til minnis um ta sálarneyð, sum gekk á Mariu Moy fyri tær líðingar, sonurin mátti tola. Í summum álmanakkum stendur eisini navnið Áskel, ið er sama navnið sum svenska navnið Eskild. Trúboðarin Eskild varð steinaður í hel við Eskildstuna í Svøríki umleið ár 1080.

*Áskel* merkir gudahjálmur.

## Eftirlýsing!



**Myndin er av "Coraliu", sum liggur á Tvøroyri. Hon liggur uttast. Hon stendur á síðu 83 í Føroya Siglingarsøgu II 1856-1940, BIND 2. Skuldi nakar átt eitt orginalt eintak av hesi myndini, so hevði eg verið ógvuliga fegin. Eg havi eisini áhuga í øðrum myndum av "Coraliu". Myndin skal brúkast í fyrsta bindinum í ævisøgu um Kaj Johannesen í Hvannasundi, sum væntandi kemur út í november**

Mær tørvar eisini aðrar myndir:

1. Hans Pauli Johannesen av Norðtoftum, d. 1915.
2. Malena Johannesen, f. Jacobsen, kona Hans Paula, ættað úr Búrstovu á Eiði. d. 1900
3. Sluppin "Primadonna", heimahoyrandi á Tvøroyri.
4. Christensen, sakførari. Ein dani, sum arbeiddi sum sakførari í Havn í tríatiárunum.
5. Orginalmynd av "King Arthur" í Hvannsundi áðrenn hon fekk hús.
6. Orginalmynd av "Jubile" í Hvannasundi.
7. Mynd av deksbátinum "Venus" sum hoyrdi heima í Hvannsundi fyrst í seinastu øld.
8. Mynd av "Langanes" sum hoyrdi heima í Hvannasundi. Antin orginal av tí, har hon liggur uttanfyri havnina, ella aðrar myndir.
9. Mynd av "Florens" har hon liggur uttan nummar fyri akker á Vestaru Vág í Havn í 1921. Ella onkra mynd seinni.
10. Orginalmyndir av skipunum hjá Müller í Havn. "Prinsessan", "Misteltoe" og "Súlan".
11. Orginalmynd av "Emerald".
12. Orginalmynd av sluppini "Fawn"
13. Orginalmynd av "Delfinen".
14. Orginalmynd av "William Glouves" úr Sandavági.
15. Orginalmynd av "Verdandi" hjá Kjølbro.
16. Orginalmynd av skonnartini "Sigrid" úr Lorvík. Hon var keypt úr Hull og nevndist tá "Faroe Bell".
17. Orginalmynd av "Star of Hope", hjá Vika-Rasmus í Fuglafirði.
18. Orginalmynd av deksbátinum "Nolsoe Poul" sum Jaspur Hjelm keypti í seinnu helvt av tjúgunum. Hann eitur "Nólsoyar Páll" í dag og er í Vági. Finnst nøkur mynd av honum sum nýggjur.
19. Orginalmynd av "Fugloynni" seinast í tjúgunum.
20. Orginalmynd av "Acorn".
21. Orginalmynd av "Karen" umleið 1936.
22. Orginalmynd av "John Bull"
23. Orginalmyndir av gamla "Skálaberg", tann frá 1933 við TN á bógnum.

Myndirnar ynskjast til láns til scanningar á prentsmiðjuni, og síðan verða tær sendar aftur til eigaran við postinum.

Annars eri eg at hitta á telduposti: justinus@post.olivant.fo ella á telefon 223143.

Adressan er: Jústinus Eidesgaard. Ovaragøta 1. FO 188, Hoyvík.